# Bestu umstøður til tónleikin

**Sørvágs kommuna hevur samtykt at byggja nýggjan musikkskúla í bygdini. Farið verður undir ætlanina beinanvegin.**

TÓNLEIKUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Sørvágur:** - Vit vilja fegin gera okkara til, at tónleikurin fær bestu umstøður at virka undir her í bygdini, sigur Jákup Suni Lauritsen, borgarstjóri í Sørvági.

Á bygdaráðsfundi í farnu viku varð nevniliga samtykt, at byggja ein nýggjan bygning uppí tann gamla skúlan í bygdini.

- Eg havi eisini skilt, at fólk eru sera fegin um hesa avgerðina, sigur hann við Sosialin.

Við hesum stiginum kemur gamli skúlin í bygdini, sum er bygdur í 1885, aftur til heiður og æru.

Skoytast kann uppí, at í fjør lat kommunan eina rættiliga stóra upphædd til Sørvágs Tónleikarafelag at keypa útgerð fyri. Hetta hendi í sambandi við, at fimmti ár vóru liðin síðani felagið varð stovnað.



*Snotuligt sær tað út, tá nýtt og gamalt hittist í hondunum á góðum arkitekti*

### Góðar umstøður

Musikkskúlin húsast í løtuni í ymiskum hølum í Sørvágs skúla.

Hesar umstøðurnar hava ikki verið nøktandi, og tí hevur kommunan tikið stig til hesa nýggju verkætlanina.

Sum skilst, er hetta at meta sum eitt eindømi, at ein lítil kommuna soleiðis at geva tónleikinum í bygdini tær bestu umstøður at húsast og blása undir.

Sørvágs Kommuna setti fyri nøkrum vikum síðani eina nevnd at arbeiða við framtíðarskúlanum í kommununi.

Í nevndini eru Jógvan Páll Joensen formaður, Eiley Weihe, Sune Jacobsen, Andras Hendriksen, Herálvur Jacobsen og Sigrun Mikkelsen.

- Nevndin hevur arbeitt við ymiskum møguleikum, og er saman við Jákup á Stongum, arkitekti komin til eitt sera gott úrslit, verður sligið fast.

Farið verður beinanvegin undir at fyrireika byggingina, sum er mett at kosta 2,4 mió krónur.

Miðað verður eftir, at arbeiðið skal verða liðugt innanfyri eitt ár.



*Nýggi musikkskúlin verður bygdur upp í tann gamla skúlan frá 1885*

# Milliónir til føroyska gransking

**Danska stjórnin setur á komandi fíggjarlóg á leið 10 milliónir krónur av til eina nýggja føroyska klima- og havstreymagransking**

TÍÐINDASKRIV
*Edmund Joensen*
*fólkatingsmaður*

Upp undir bæði valini í vetur fór Sambandsflokkurin til val uppá at fremja gransking í víðari merking, og longu nú verða vallyftini framd í verki.

Hóast Sambandsflokkurin ikki kom í samgongu í Føroyum, kom undirritaði fólkatingsmaður floksins upp í donsku samgonguna hjá Anders Fogh Rasmussen. Góða samgongusamstarvið á Christiansborg ber nú í sær, at ein stór føroysk granskingarætlan gerst veruleiki.

Granska í klima og havstreymum

Tann 1. januar 2009 byrja fýra granskarar millum annað at granska, hvørja ávirkan tær nógv umrøddu alheims klimabroytingarnar hava á havstreymarnar kring Føroyar og á týðandi fiskastovnar, ið eru sjálvt grundarlagið undir tilveruni í Føroyum.

Talan er um eina umfatandi trý ára granskingarætlan, ið verður stýrd av granskarum á Fiskirannsóknarstovuni, ið eisini verður granskingarmiðdepil.

### Fýra granskingarevni

Fyrireikingarnar til hesa stóru og týðandi granskingarætlan eru longu byrjaðar í samstarvi millum Fiskirannsóknarstovuna og donsku Ráðharrastovuna fyri Vísindi, Tøkni og Menning.

Í hesum døgum fer ráðlegging fram, og longu nú er greitt, at fýra høvuðstættir skulu granskast:

1. Sambandið millum heimsfevnandi klimaið og havstreymarnar við Føroyar
2. Klimamodel-scenariir fyri Føroyar
3. Ávirkanin, ið klimabroytingar hava á havstreymar og vistskipanina í havinum og á pelagisku fiskastovnarnar á føroyskum øki
4. Ávirkanin, ið klimabroytingar hava á havstreymar og vistskipanina á Føroyaleiðini (Faroe Shelf)

Fýra granskarar skulu arbeiða við hesum evnum, og tí skulu fýra ph.d.-størv setast. Granskararnir skulu innskrivast við eitt universitet í Føroyum ella Danmark, og teir skulu brúka helvtina av granskingartíðini í Føroyum. Vegleiðing kunnu granskararnir fáa á øðrum universitetum, ið fylgja somu evnum. Møguleiki er fyri, at nýggja føroyska granskingarætlanin kann fáa samband við granskingarumhvørvið í ES-londum.

Endaliga úrslitið av granskingini skal fyriliggja í einari frágreiðing í 2012.

### Umleið 10 milliónir at granska fyri

Hóast danska fíggjarlógin fyri 2008 ikki verður samtykt fyrr enn seinni í ár, er greitt, at danska stjórnin fer at seta umleið 10 milliónir krónur í føroysku granskingarætlanina.

Pengarnir fara til fyrireikingararbeiði, granskaralønir, ferðing, útgerð, kanningarvirksemi á Fiskirannsóknarstovuni o.a.

Eftir føroyskum mátistokki eru 10 milliónir krónur nógvir pengar til eina einstaka granskingarætlan. Til sammetingar fekk Fiskirannsóknarstovan í fjør tilsamans góðar 20 milliónir krónur á føroysku fíggjarlógini. Tá er raksturin av rannsóknarskipinum íroknað.

### Skjótt politiskt arbeiði

Danska stjórnin hevur arbeitt sera skjótt við at fáa granskingarætlanina á føtur.

Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, og undirritaði fólkatingsmaður høvdu samrøður um danska samgonguskjalið í november, og eftir hetta komu ítøkiligar orðingar um granskingina við í samgonguskjalið. Helge Sander, granskingarmálaráðharri, fór beinan vegin til verka, og longu í januar vóru embætisfólk hansara í Føroyum á fundi við Fiskirannsóknarstovuna. Nú er komið so mikið áleiðis, at Lars Løkke Rasmussen, fíggjarmálaráðharri, kann seta krónur og oyru á verkætlanina.

Verkætlanin, sum vónandi gevur okkum týðandi nýggja vitan um støðuna í havinum kring Føroyar, nú klimabroytingarnar gera um seg, er eitt sera gott dømi um, hvussu væl tað ber til at samstarva innan Ríkisfelagsskapin, um rætt verður atborðið.

Stórur munur er á at standa í túninum uttan fyri Christiansborg og rópa, og so at samstarva konstruktivt innan fyri dyrnar, har ávirkan fæst. Tað var júst samstarvið innanfyri, ið Sambandsflokkurin fór til val uppá við fólkatingsvalið tann 19. november í fjør.